# TILTØK

## BRÚDLEYP

Í dag, 16. august giftast í Nordstrand kirke, Oslo, Lina Lysaker og Kent Heinesen, sonur Hallgerð Heinesen og Poul D. Jensen. Adr.: Jacobaallsgade 45 B, Oslo.

Í dag, 16. august giftast í Sandby kirke Katrin Bloch Heinesen, dóttur Elsu Bloch Heinesen og Jóannes Heinesen í Sandavági, og Boris Gerencer úr Fraklandi. Brúleypsadr.: Søparkallé 10, 4171 Glumsø.

Í dag, 16. august kl. 16.00 giftast í Sands kirkju Arnleyð Tungá og Bergleif Sólsker, bæði av Sandi. Veitslan verður hildin í Samljóð í Skopun kl. 19.00.

Leygardagin 16. august giftast í Niðurlondum Høgni Sundstein Jóanesarson úr Vestmanna og Frederike Hammerstein úr Arnhem. Brúdleypsadr.: Hammerstein, Van Pads Straat No. 1, NL-6814 HA Arnhem.

Leygardagin 23. august kl. 13.00 giftast í Nebo á Toftum Bergljót Elisabeth Jacobsdóttur Hansen, Skopun og Hans Andrias Vang, Toftir. Aftaná vígsluna verður vælkomst við kaffi og køkum í Berøa, Runavík. Døgurði fyri innbodnum kl. 19.00.

Leygardagin 6. september kl. 14.30 giftast í Skála kirkju Kristina Viderø Olsen, Skáli og Niklái Nysted, Hvannasund. Døgurði verður fyri innbodnum. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 20.30. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 442149, 215670, 441861 ella 452105 áðrenn 31. august.

Leygardagin 6. september kl. 11.00 giftast í Býráðshúsinum í Hirtshals, Sigga Ása Eliasen og Thorvald Thomsen úr Klaksvík. Brúdleypsadr.: Jernbanegade 13 1. th. 9850 Hirtshals. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, kunnu siga frá á tlf. 96568010 ella 456147 innan 23. august.

Leygardagin 6. september kl. 17.00 giftast í Christianskirkjuni Ingrid Poulsen og Jóhan Danbjørg Heinesen, Klaksvík. Veitslan verður í Skálanum kl. 19.30. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá í seinasta lagi 28. august á tlf. 456522.

## GULLBRÚDLEYP

18. august hava hjúnini Esther og Sámal Mikkelsen, Klaksvík gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin sunnudagin 17. august frá kl. 15.00 í heiminum undir Hálsi 25. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 30. august hava hjúnini Andrea og Jaspur Larsen á Oyrabakka verið gift í 50 ár. Vælkomst verður í Eydnuni á Oyrabakka kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða gullbrúðarparið við at koma, biðjast vinarliga at siga frá á tlf. 422055 ella 281043 innan 18. august.

## PRÓGV

Brynhild Næs Petersen, Fuglafjørður, hevur á Blaagaard Statsseminarium tikið læraraprógv 23. juni 2003.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 16.08. Runavík tlf. 44 70 10
Sunnudagin 17.08. Skála tlf. 44 14 90

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.

**Gudstænastur**
*9. sunnudagur e. trinitatis*
*Havnar kirkja:* kl. 11, Bjarni Bæk
*Hvítanes:* kl. 11, Erland Beder
*Vesturkirkjan:* kl. 11 altarg., talvan gongur fyri KFUM í Havn
*Norðradalur:* kl. 14 altarg., Bergur D. Joensen
*Gjógv:* kl. 12 messa, Emil Olsen
*Bøur:* kl. 11 altarg., David Johannesen
*Fugloy:* altarg., Elsa Funding
*Leirvík:* kl. 11, altarg.,
*Funningarfjørður:* kl. 16, altarg., UniNæs
*Saksun:* kl. 11,
*Hvalvík:* kl. 12. Vitjan av Kingokórinum, Mogens Tilsted Christensen
*Strendur:* kl. 11, (tríggir kingomenn) lestur
*Skála:* kl. 11 altarg., Jógvan Fríðriksson
*Christianskirkjan:* kl. 11, Hans Elias Hammer
*Árnafjørður:* kl. 11, altarg., Niels Pauli Danielsen
*Skopun:* kl. 12, Jákup R. Hansen
*Tvøroyri:* kl. 11, Jónsvein Bech
*Vágur:* kl. 11 Ólavur Rasmussen

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudag kl. 11 og 18 Møti.
Mikudag kl. 15 Bønarfundur.

**Adventkirkjan**
Í dag kl. 10 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Jesus og paktin, kl. 11 Gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Í dag After Eight: høllin er opin frá kl. 13-15.
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ fam. Skipá.

Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

**Samkoman Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin familjumøti kl. 10.30 har evnið er: Signing av børnum, og tilbiðjunarmøti kl. 12, har Absalon Áargarð talar um Tey fimm endamálini – tilbiðjan. Barnaansing er undir báðum møtunum fyri børn undir skúlaaldur. Sunnudagsskúlin er kl. 12. Drekkamunnur er millum bæði møtini.
Týskvøldið kl. 20: Húsbólkarnir samlast.
www.livdin.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Patrick Sheils í Mariukirkjuni.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 er Morgunmøti, Regin Guttesen talar og syngur. Barnaansing er samstundis. www.hebron.fo

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Steve Dulwich, kl. 16 Samkomufundur.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman byrja raftur við teimum fýra.

**Ebenezer**
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og Uppbygginarmøti.
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 18 Evangel. møti, kl. 21 Útimøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin 17. august Møti v/ Petur Fonsdal Johannesen, Tórshavn.

**Meinigheitshúsið, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Bergi D. Joensen.

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti og kl. 18 Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Glæman í Kvívík**
Sunnudagin kl. 18 Møti við Thorstein Johannesen, trúboðara.

**Hvalvíkar missiónshús**
Felagsmøti verður leygardagin kl. 20 v/ Knud Larsen og Petur Johannesen, Gittit syngja. Øll eru vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Maibritt Frederiksberg. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við Símun Jacobsen.
Mánakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 17.30 Bøn- og lovsongsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti. Verið hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Sunnukvøldið kl. 19 Møti, Ingibjørn Eldevig talar.

**KFUM & K í Norðoyggjum**
Hóskvøldið kl. 20 Bíbliutími.
Fríggjakvøldið kl. 22 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Petur Martin Glerfoss. Ungdómsmøti kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.kuff.fo

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Tove og John Hammer. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Café One Way, Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 20 Møti við Steven Dulwich. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 16 Møti, David Bech talar. Øll eru vælkomin.
Mánadag: Bønarmøti kl. 21. frá kl. 21 til 23 verður bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Frelsunarherurin,Vágur**
Leygarkvøldið kl. 20 Bøn- og lovsongsmøti.
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti við Eddie Bech og Finnboga olsen.

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Gongutúrur til Heiðavatn og Øksnadal. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Tungur túrur, gingið verður uml. 5 tímar. Havið heit og góð gonguklæðir og matpakka við. Tilmelding.

**Eysturoyar gongufelag**
Túrurin niðan á loysingarfjall verður sunnudagin. Túrurin er miðal. Vit møtast á Shellstøðini í Vestmanna kl. 14. Ferðaleiðari verður Símun Hansen. Tilmelding á tlf. 443252.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Varið tykkum fyri svikaprofetum.*

***Matt.** 7,15*

Profetarnir vórðu sendir av Guði. Nógv halda, at teir upprunaliga tókust við at spáa um framtíðina. Men tað gjørdu teir bara uppímillum sum ein partur av nøkrum, ið hevðir størri týdning. Teir høvdu hoyrt rødd Guðs og kundu siga fólki Hansara, hvat ið Guð meinti. Guð hevur altíð eina meining við tí, sum hendir, men tann meiningin kann vera ring at síggja, serstakliga um ein hevur roynt at liva upp á egna hond og mest viljað gingið sína egnu leiðir. Tað var hetta, sum Ísrael so ofta gjørdi. Tá komGuð upp í leikin, og tað, sum Hann gjørdi fyri at ávara og vekja fólk sítt, læt Hann profetarnar greiða frá. Uppímillum kundu profetarnir eisini tala um ætlanir Guðs í tí fjaru framtíð. Tað vóru teir, sum komu við lyftinum um Messias.

Sjálvt í fornkirkjuni funnust profetar. Kirkjan er bygd á grundvøll ápostlanna og profetanna, har hornasteinurin er Kristus Jesus sjálvur. Eisini profetarnir í Nýggja Testamenti tulkaðu meining Guðs við tí, sum hendi. Teir góvu leiðbeiningar um, hvussu ið kirkja Guðs skuldi gera undir mongum svárum umstøðum, sum tey ongantíð fyrr vóru komin í. Teir talaðu orð, sum vórðu teimum givin av tí Halga Anda. Millum Andans mongu gávur nevnir Paulus profetagávuna sum eina av teimum týdningarmestu. Hon kundi verða givin bæði monnum og kvinnum, men tað vóru bara nøkur, sum fingu hana.

Nú finnast tað svikaprofetar, sigur Jesus. Úteftir síggja teir kanska út sum kristnir. Teir stíga fram sum talsmenn Guðs. Í øllum førum tala teir um Guð, og kunnu teir gera tað ógvuliga avgjørdir. Men teir eru svikaprofetar.

Hvussu skulu vit vita tað? Hitt fyrsta vissa prógvið er sjálvandi, um teir siga nakað annað enn tað, sum Jesus hevur sagt okkum, beinleiðis í lívstíð síni ella gjøgnum ápostlar sínar. Men sjálvt ein svikaprofetur kann tala soleiðis, at tað ljóðar púra rætt. Hitt avgerandi í kristindóminum er at enda Kristus sjálvur, og trúgvin á Hann er altíð eitt petti av egna lívi Hansara. Kristus er hjá teimum, sum eru Hansara, og er Hann ikki har, tá eru teir ikki kristnir. Er Hann har við Anda sínum, tá verður tað frukt. Í Efesusbrævinum hoyra vit nógv um ta fruktina. Her skal vera verða mint á, at hon sum sagt finnst har, og at hon má kunna kennast á ein hátt, sum onnur kristin kenna aftur. Kristuslívið í tí einu menniskjuni kann altíð á onkran hátt bera kenslu á Kristuslívið hjá hinari – um tað av sonnum er spurningur um lívið frá Kristi.

**Niels Pauli Danielsen**



# TILTØK

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 18. august*
kl. 10 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 Ítriv
kl. 14-18 Kortspæl, landastrok, bobbspæl, telving, dart og onnur spøl
*Týsdagin 19. august*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Vit syngja, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Prát um tað sum verður í morgin frá 10-17
*Mikudagin 20. august*
kl. 10-17 Hvat skulu vit gera í vetur? Øll eru hjartaliga vælkomin at koma við hugskotum
*Hósdagin 21. august*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Opið hús
*Fríggjadagin 22. august*
kl. 10-17 Hvat skulu vit gera í vetur? Øll eru hjartaliga vælkomin at koma við hugskotum.

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Vága Gongufelag**
fer túr um viðrar niðan í Tjørndal, millum Bø og Gásadal sunnudagin kl. 14. Vit byrja við Skarðsá. Havið góð gonguklæði og kaffi við. Tilmelding á tlf. 353300.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**Tilhaldið í Sandoynni**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Javni**
Skrivstovan er *stongd vegna summarfrí.* Opið er aftur 11. august 2003.
Hevur tú atrokandi boð ella spurning, so ring til lim í starvsnevndini ella økisnevndini.
Heimasíðan: www. javni.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er farin í feriu frá 26. juni til 1. september

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Heilafelagið, MBF-húsið**
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317,

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@gikt.fo
www.gikt.com
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: týs- og hósdag kl. 11.00-14.00.
**Fibromyalgibólkurin:** Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
**Foreldraumboð:**
Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50
**Ungdómsumboð:** Sára Tummassardóttir tlf. 37 31 06.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo heimasíðan: www.deaf.fo

**Ráðgeving um heilaskaðar**
Hevur tú fingið ein heilaskaða, ert avvarðandi ella arbeðir við fólki við heilaskaða og hevur tú okkurt at spyrja um hesum viðvíkjandi ella annað, so ert tú vælkomin at venda tær til okkara.
NeuroCom, 450 Oyrarbakki
Tlf. 422 763 ella Fartlf.: 225 263
Teldupostur: info@heilsu.info
www.heilsu.info
e-mail: fhkv@post.olivant.fo
Hildebjørg, tlf. 313897,
e-mail:
jwimport@post.olivant.fo
Nakað av bókum eru til láns hjá felagnum.

**MBF – Meginfelag teirra brekaðu**
*Íslandsvegur 10c*
*FO-100 Tórshavn*
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Tlf. 317373, fartlf. 264839
faks. 310813
Teldupostur: mbf@mbf.fo
Heimasíðan: www.mbf.fo

**Alzheimerfelagið**
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

**Sinnisbati**
Íslandsvegur 10 C, 100 Tórsh.
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

**Cøliakifelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
*Grønlandsvegur 58, Tórshavn*
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Nýrafelagið**
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 314796, Hallbjørg

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost: Amnesty-Amnesty.fo

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098 · Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c,
Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: hvønn hósdag kl. 16.30-18.00.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**BRÚKARASAMTAKIÐ**
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919,
hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210,
gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832,
trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883,
kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn


HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo
Listastevnan



Leygardagin 16.08. kl. 17.00
Sunnudagin 17.08. kl. 17.00



Leygardagin 16.08. kl. 16.30
Sunnudagin 17.08. kl. 16.30



Leygardagin 16.08. kl. 15.00
Sunnudagin 17.08. kl. 15.00




HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo



Leygardagin 16.08. kl. 20.30
Leygardagin 16.08. kl. 23.00
Sunnudagin 17.08. kl. 19.30
Sunnudagin 17.08. kl. 22.15



Leygardagin 16.08. kl. 23.30
Sunnudagin 17.08. kl. 23.15



Leygardagin 16.08. kl. 21.00
Sunnudagin 17.08. kl. 21.00



Leygardagin 16.08. kl. 18.45
Sunnudagin 17.08. kl. 18.45

KOMANDI FILMUR


Frumsýning
Fríggjadagin 22.08.

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu